**Samráðingarfundur millum FMR og handverkarafeløgini tann 10 juli 2020 kl 13.00**

Fundurin var í Tinganesi (Portugálinum)

**Fyri FMR:** Snorri Fjallsbak og Marjun Jacobsen.

**Fyri LFH:** Danial P Djurhuus,form og Eli Brimsvík,nastf.

**Fyri FHF:** Suni Simonsen,form og Heini Heinesen,nastf.

**Fundurin byrjaði við,at Snorri beyð vælkomin.**

Hann boðaði frá,at tey eingi beinleiðis krøv høvdu til handverkarafeløgini..

Handverkarafeløgini løgdu síni krøv fram,sum var ein eitt ára sáttmáli gjørdur útfrá, at vit júst tá høvdu gjørt ein slíkan við KAF,har vit fingu 795.00 kr afturat lønini um mánaðin galdandi frá 1 okt 2019 til 1 okt 2020. Hettar vildi FMR ikki ganga við til,men kom við uppskoti um ein 3 ára sáttmála ístaðin,har fyrsta árið var galdandi fram til 1 januar,2021 Uppskot frá FMR var hettar:

Fra 1 okt 2019 til 1 januar 2021 + 795.00 kr afturat um mánaðin

Frá 1 jan 2021 til 1 oktober 2021 + 2,05 %

Frá 1 okt 2021 til 1 oktober 2022 + 1,25%

Kl 13.30

Handverkarafeløgini bóðu um ein steðg og umboðini fyri FMR fóru úr hølunum.

Vit tosa um at biða um ein nýggjan fund,men tá vit løgdu tað fyri Snorra boðaði hann frá,at hettar tilboði bert var galdandi tá,tað vil siga at ein avtala skuldi gerast í sama dag.

Rokna var uppá ,hvat teirra uppskot gav í prosentum og komi var fram til at hettar gav 6,29% .Við onkrum smarri broytingum inni í sáttmálanum liggur samla tal uml 7%.

Í § 3 verður nýtt soljóðandi stk.6: Arbeiðsgevarin kann,tá serligar umstøður gera seg galdandi,við handverkaran avtala eina serliga persónliga flokking í eitt ávíst lønarstig,hettar er tildømis har sáttmáli hjá STMF gevur hægri løn fyri sama arbeiði.Ein slík avtala skal góðkennast av fíggjarmálaráðnum.

Eisini var tosa um vaktargjøld hjá tímaløntum og fastløntum.FMR kundi ikki javnseta vaktargjøldini hesaferð,tí tað vildi farði væl uppum karmin.

Eisini var avtala,at FMR skuldi geva beinleiðis boð til stjóran á LV,um at fáa avgreitt ein tímaløntan sáttmála,galdandi millum LV og Handverkarafeløgini.

***E/S*** *Viðmerkjast kann, at áhugi at leggja fram okkara uppskot (plan B) um 3 ára sáttmála, ikki var til staðar og var tí ikki viðgjørt.*

Sáttmálin og lønartalvurnar verða dagførdar sambært omanfyristandandi.semju.

EB skr.